

The Dreams hava frambrot at fegnast um í hesum døgum

# The Dreams í 12 londum

**THE DREAMS** SKRIVA Í KOMANDI VIKU UNDIR **ENN** EIN SÁTTMÁLA, OG ERU TEIR SOSTATT **FLØGUAKTUELLIR** Í **12** LONDUM. Í NÆSTUM **VITJA** TEIR Í FØROYUM



TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Føroyski rockbólkurin The Dreams er rættiliga við at koma fyri seg í londum uttanfyri Føroyar.

Í tvey ár hevur bólkurin veruliga havt undanvind í Danmark, har teir hava havt eitt hitt fyri og annað eftir. Serliga á sonevnda Boogie listanum hjá DR hava teir verið populerir, og í fjør áttu teir tann sangin, sum stóð seg best á listanum.

Nú royna The Dreams at vinna fram uttanfyri Danmark, og har eru frambrot at fegnast um.

### Útgivnir í 12 londum

The Dreams skriva í komandi viku undir enn ein sáttmála, og eru teir sostatt fløguaktuellir í 12 londum.

Hvønn týdning hetta kemur at hava fyri víðari ferðina hjá The Dreams millum tónleikastjørnurnar er ilt at siga, men tað tykist ganga rætta vegin. Nýggjasti sáttmálin um utgávu er í Týsklandi.

Hinvegin er greitt, at The Dreams koma til Føroya at spæla í næstum. Teir spæla í Deep í Havn tann 23. apríl og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 24. apríl.

## INNIHALD

4 BAKGRUND: **FUSKI VIÐ MATINUM**
6 HEILSA: **SMOOTHIES**
7 TIPS: **LUTIR TIL BILIN**
8 90 SEKUND: **SIGRÚN BREND**
10 FERÐAFRÁSØGN: **RÁS2 Á SEYÐISFIRÐI**
12 REPORTASJA: **MARGRETA DROTNING, 70 ÁR**
14 TIL ARBEIÐIS: **BRYNHILD JOENSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **FØROYSKIR SNIÐGEVAR Í TOPP**
17 REPORTASJA: **URTAGARÐSFYRIREIKING**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **SPINATPANNUKØKUR**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR.**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

## KLUMMAN



*Birgir Waag Høgnesen*

# Hvør vil verða í Depli?

Her er so steindeytt í Føroyum, her hendir einki. Arbeidsloysið er í topp og politikararnir bara tosa, heldur enn at fáa fingurin úr einum ávísum stað.

Nú tosa teir um, hvønn veg man skal fara, antin at spara seg burtúr kreppuni ella at leggja avgjøld á vinnuna, so inntøkur koma tann vegin. Møguliga koma teir til eina millumloysn.

Politikarar kunnu saktans vera samdir, ja, píkarill kunnu teir tað.

Teir eru samdir um, at Magni Laksafoss stendur uttan fyri samgonguna, men er í samgonguni.

Herfyri vóru teir samdir um ikki at fara niður í løn, um ikki at gera Sandoyartunnilin, um ikki gera tunlarnar nordur um Fjall, og teir eru samdir um ikki at slíta samgonguna.

Í aðrar mátar kunnu teir eisini saktans verða samdir.

Teir eru samdir um, at Uttanríkisráðið er óneyðugt, og at tað burdi bara verið seks aðalráð. Sig so tad!

Fyri nøkrum áðrum síðan vóru teir sera samdir um, at alt skuldi leggjast í deplar og toymir. Vit minnast øll byrjanina til Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, Depilin fyri Minnisveik, Skúladepilin á Kambsdali, Skúladepilin í Hovi og Skúladepilin í Marknadgilið, alt deplar sum eru komnir ella eru á veg.

Tad var ein hurlivasi, tá ið allir hesir deplarnir skuldu byggjast. Ongin vildi av við sítt til nevndu deplar. Hvør minnist góðu argumentini um ikki at flyta skúlan av Tvøroyri til depilin í Hovi. Hvør minnist ikki mótmælini um at flyta HF úr Gøtugjógv til Kambsdal.

Tað er helst gott at ganga í depli, sum hevur postnummar 735. Tað eiga tey bæði fólkini, sum búgva í Depli helst at siga. Tey hava gott útsýni yvir á sunnastu húsini í Hvannasundi og síggja í norðara enda á Svínoynni. Tá ið mjólkarbáturin fer damlandi til Fugloyar og Svínoyar ein gódan summardag er gott at búgva í Depli. Har hoyrist einki um nakran, sum ikki vil vera í Depli.



Depil

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Drotning Margrethe / Polfoto